VINNUMÁLARÁÐIÐ

# Avloysari fyri leiðsluskrivara í barnsburðarfarloyvi

Vegna starvsfólk í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir leiðsluskrivara til Vinnumálaráðið at byrja 12. september 2005 og í uml. 12 mánaðir fram.

Arbeiði fevnir um:
- Landsstýrismannaskrivari
- Dagføringar av heimasíðuni
- Fyrifallandi skrivstovuarbeiði, t.d.
  - rættlestur
  - málsavgreiðsla
  - journal og postavgreiðsla

**Vit hugsa okkum, at tú hevur:**
- skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving
- hollan kunnleika til føroyskt, danskt og enskt
- kunnleika til EDV á brúkarastøði
- góð samstarvsevni

**Vit bjóða:**
Eitt fjølbroytt og spennandi starv, sum tú sjálv/sjálvur verður við til at skapa, til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi við góðum skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, viðmælum o.ø. verða sendar til:

**Vinnumálaráðið**
Postrúm 377
110 Tórshavn

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 9. august 2005.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Vinnumálaráðið á telefon 35 60 60.

# Kunnandi fundur fyri lesandi

Meginfelag Føroyska Studenta og Altjóða Skrivstovan skipa fyri kunnandi fundi í Miðlahúsinum í Vágsbotni, Havn

**sunnudagin 7. august kl. 17.00.**

Fundurin fer at snúgva seg um praktisku, fíggjarligu og sosialu viðurskiftini sum lesandi. Føroysk lesandi í Danmark, Norðurlondum, Stóra Bretlandi og øðrum londum verða við á fundinum og hvørvi verður at seta spurningar.

**MFS og ASK**

**Sjóbjargingarstøðin MRCC-Tórshavn**
Tlf: +298 351300 • Fax: +298 351301
Telex: 81200 TLGR FA
Inmarsat C: 423 116210 • Inmarsat B: 323 116220 (voice)
323 116221 (Fax)

# Fráboðan um seismikkvirksemi

Lýst verður, at seismiskar kanningar verða gjørdar á hesari havleið.

| | |
|---|---|
| 61º21' N | 004º57' W |
| 61º17' N | 004°49'W |
| 61°12' N | 004°56' W |
| 61º17' N | 005º03' W |

Gardline Geosurvey kannar havleiðina.
Kanningarnar verða gjørdar vegna Statoil Exploration.

| | |
|---|---|
| Byrjað verður umleið......... | 02-08-2005 |
| Arbeiðið tekur væntandi....... | 7-10 Dagar |
| Skipanavn........................ | Sea Surveyor |
| Kallibókstavir/Flagg........... | C6QL6/Bahamas |
| Fiskiveiðiumboð.............. | Eli Lassen |

Samband fæst við skipið á VHF rás 16.

Upplýsingar um kanningararbeiði fáast frá Tórshavn Radio, á telefon 351300, ella á telefax 351301.

Eisini verður víst til heimasíðuna www.mrcc.fo

**Sjóbjargingarstøðin MRCC-Tórshavn**
Tlf: +298 351300 • Fax: +298 351301
Telex: 81200 TLGR FA
Inmarsat C: 423 116210 • Inmarsat B: 323 116220 (voice)
323 116221 (Fax)

# Fráboðan um seismikkvirksemi

Lýst verður, at seismiskar kanningar verða gjørdar á hesari havleið.

| | |
|---|---|
| Útnyrðingshornið | 60º39' N 005º29' W |
| Landnyrðingshornið | 60º37' N 005º26' W |
| Landsynningshornið | 60º35' N 005º29' W |
| Útsynningshornið | 60º37' N 005º32' W |

Felagið Gardline Geosurvey kannar havleiðina.
Kanningarnar verða gjørdar vegna BP Exploration.

| | |
|---|---|
| Byrjað verður umleið.............. | 05-08-2005 |
| Arbeiðið tekur væntandi......... | 4 Vikur |
| Skipanavn.......................... | Sea Profiler |
| Kallibókstavir/Flagg.............. | HP6791/Panama |
| Fiskiveiðiumboð.................... | Ebbe Michelsen |

Samband fæst við skipið á VHF rás 16.

Upplýsingar um kanningararbeiði fáast frá Tórshavn Radio, á telefon 351300, ella á telefax 351301.

Eisini verður víst til heimasíðuna www.mrcc.fo

LØGMANSSKRIVSTOVAN

# Sendimaður

## til sendistovu Føroya í Keypmannahavn

Starv sum sendimaður til Sendistovu Føroya í Keypmannahavn er leyst at seta frá 1. oktober 2005 ella so skjótt sum til ber. Starvið verður sett á Løgmansskrivstovuni og starvsstaðurin er fyrstu 3 árini í Keypmannahavn.

Uppgáva sendimansins er at virka fyri áhugamálum landsins, at umboða myndugleikar landsins mótvegis donskum myndugleikum og myndugleikum í hinum Norðurlondunum, at røkja sambandið við Norðurlendska Ráðharraráðið, frammandu sendistovurnar í Keypmannahavn og aðrar stovnar í Danmark.

Sendistovan í Keypmannahavn hevur breitt uppgávuøki m.a. á vinnuøkinum, á mentanarliga økinum og viðvíkjandi samfelagsviðurskiftum í síni heild

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla ella samsvarandi førleika.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Tann, ið verður settur skal hava góð samstarvsevnir og evnir at leiða, vera áhittin, miðvísur og duga at arbeiða sjálvstøðugt og skipa fyri. Tað er fyrimunur at viðkomandi hevur royndir frá miðfyrisitingini ella góðan kunnleika um arbeiðið í miðfyrisitingini. Harumframt skal viðkomandi vera framsøkin, væl fyri í samráðingarhøpi, duga at samskifta bæði formliga og óformliga, hava góðan málførleika, duga at skapa og røkja samband við viðkomandi fólk, myndugleikar og felagsskapir.

**Løn- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag, og verður flokkað svarandi til ráðgeva I, eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya ella samsvarandi útbúgving og royndum. Veitt verður ein bústaðar- og útiviðbót, sum er 8.212,50 kr. um mánaðin.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívsrensli o.ø. skulu vera Løgmansskrivstovuni, Postrúm 64, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 31. august 2005.

Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Marjuna Hanusardóttur, løgmansstjóra, ella Herluf Sigvaldsson, deildarstjóra á tlf: 351010 at fáa nærri at vita um starvið.

*Sendistova Føroya í Keypmannahavn er partur av Løgmansskrivstovuni - Uttanríkisdeildini, ið er fyrisiting landsins í uttanríkismálum. Á sendistovuni starvast sendimaður og tvey starvsfólk.*